## Inga Poulsen Dam heldur kvinnurøðu í Miðvági



Altjóða kvinnudagin, sunnudagin 8 mars kl 15.30, skipar Kvinnubólkurin í Vágum fyri hugnaløtu við fyrilestri, sangi o.ø. í Bygdaskúlanum í Miðvági. Inga Poulsen Dam tosar um evnið: Kvinnan, ein duramátta. Trioin við Dortheu, Jensiu og Óluvu syngur. Drekkamunnur fæst við onkrum afturvið og sum vanligt verður tjak á skránni. Tiltakið er ókeypis og øll eru hjartaliga vælkomin, sigur Kvinnubólkurin í Vágum.

## Marianna Debes Dahl heldur røðuna

Skráin í Vestmanna hetta kvøldið er rættiliga fjølbroytt: Tovesa Tølandi Trio fer at spæla harmonikutónar, væluppløgdu fyrireikararnir bjóða vælkomin, Ria og Súsanna Tórgarð framføra fleiri smærri leikir, og ungar vestmannakonur fara at syngja. Marianna D. Dahl heldur 8. mars røðuna. - Umframt hetta verður høvi at fáa sær ein kaffimunn ella annan leskandi løg umframt mat - og ikki minst at práta og hugna okkum saman. Haldið verður sunnukvøldið 8. mars kl. 19.00 á Bryggjuni, og allir vestmenningar og onnur áhugað eru vælkomin, siga fyrireikararnir. Haldið er ókeypis og er fyri øll yvir 18 ár.

# Silver Fjord føroyska brúgvin til Skotlands



**- Rutan millum Føroyar og Skotlands er komin fyri at vera, og vit eru stak væl nøgd við gongdina higartil. Tað hevur gingið væl, og vit halda, at uppaftur størri potentiali liggur í hesi rutu, sigur Andreas F. Hansen, nevndarformaður í Fresh Link**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vit hava vitjað inni á gólvinum á skrivstovuni hjá Fresh Link á Toftum, sum rekur farleiðina millum Toftir og Scrabster við skipinum Silver Fjord, ið er fyrrverandi Star Saga.

Við skrivaraborðini sita stjórin í felagnum, Ingun Olsen, sum hevur fleiri ára royndir í føroysku shippingvinnuni og nevndarformaðurin, Andreas F. Hansen, sum er royndur í føroysku fiskavirkisvinnuni.

Hýrurin er góður, og tey bæði lata væl at gongdini við farleiðini – ella brúnni millum Føroyar og Skotlands - sum í summar hevur eitt ár á baki.

- Vit byrjaðu at sigla millum londini 7. juli í fjør, og vit eru væl nøgd við gongdina. Í miðal hevur flutningurin verið stívliga 300 tons um vikuna, helmingurin aldur fiskur og hin helmingurin veiddur fiskur.

Silver Fjord hevur tvær fráferðir úr Føroyum um vikuna, mánadag og fríggjadag.

- Flutningurin hevur sum heild verið størri fríggjadag enn mánadag, men vit fara at halda fram við tveimum fráferðum, sum eisini gevur eina betri tænastu hjá útflytarum.

Andreas F. Hansen vísir á, at Fresh Link hevur eitt longri leigumál við Silver Fjord við møguleikum fyri leingjan.

- Tá vit fóru undir hesa uppgávu, løgdu vit stóran dent á, at hetta ikki er nøkur royndarverkætlan, men ein farleið, sum er komin fyri at vera. Vit eru ikki minni sannførd í dag, nú fyrsta hálvár væl og virðiliga er lagt aftur um.

Nevndarformaðurin sigur, at tey eru sera væl nøgd við skipið, ið hevur víst seg at riggað ómetaliga væl til júst hesa uppgávu.

- Skipið er leigað frá einum norskum felag, men eingin norðurlendingur, ei heldur føroyingur, er umborð. Øll manningin er eysturlendingar, og hetta hevur víst seg at riggað sera væl. Vit eru stak væl nøgd við ta manning, ið er umborð á Silver Fjord, sigur hann.

### Størri potentiali

Vit spurdu eisini Andreas, um Fresh Link hevur gjørt nakað serligt fyri at fáa annan flutning enn fisk við skipinum.

- Higartil hava vit at kalla burtur av tikið okkum av at fáa fiskaflutningin at rigga so væl sum tilber. Hinvegin er einki at ivast í, at aðrir møguleikar eisini liggja í hesi farleið.

Nevndarformaðurin vísir á, at eitt sløð hevur verið av øðrum flutningi enn fiski úr Skotlandi, men talan hevur higartil ikki verið um stórvegis nøgdir.

- Alt, sum er nýtt, krevur sína tíð til uppbygging, og soleiðis er eisini við hesum. Fólk skulu eisini hava álit á, at hetta er nakað, sum er komið fyri at vera.

Andreas F. Hansen heldur, at góðir møguleikar liggja í innflutningi av eitt nú grønmeti og fruktum úr Glasgow, har stórir innkeypsmøguleikar eru.

- Men eisini her tekur tað tíð hjá føroyskum keyparum at fáa í lag avtalur, og tað er ikki bara sum at siga tað hjá handilslívinum í Føroyum at leggja innkeypið um – úr Danmark til Skotlands, sigur nevndarformaðurin í Fesh Link.

Tað er ein fimmannanevnd, sum stendur aftanfyri felagið, og í hesi nevnd situr eitt nú Páll Gregersen, stjóri á Fiskavirkinum í Gøtu.

- Líkamikið, hvør eigur felagið ella situr í nevnd felagsins, er Fresh Link eitt felag, sum verður rikið á handilssligum grundarlagi, staðfestir Andreas F. Hansen, sum onga løtu ivast í, at "brúgvin", sum er skapt millum Føroyar og Skotlands við Fresh Link og Silver Fjord er komin fyri at vera.



*- Sum laksafóður hevði virðið av 30.000 tonsum av hvítingsbróðuri verið einar 150 miljónir krónur, sigur Sigurd Simonsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Hvítingsbróðir

**Sigurd Simonsen, fyrrverandi fiskimaður og reiðari, heldur, at fiskiveiðimyndugleikarnir í Føroyum eiga at loyva royndarveiði eftir hvítingsbróðuri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Eg var við í fiskiskapinum eftir hvítingsbróðuri seinast í sjeytiárunum og fyrst í áttatiárunum. Tá var eingin trupulleiki við íblanding av hýsuyngli. Hetta komst av tí einføldu orsøk, at fiskiskapurin eftir hvítingsbróðuri gekk fyri seg ytri og á djúpari vatni, enn hýsuyngul uppiheldur sær, tá hann tekur botn.

Tað sigur Sigurd Simonsen, núverandi borgarstjóri í Fuglafirði, í lesarabrævi,